Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	7. mars 2024
Málsnummar:	23/18138
Málsviðgjørt:	gál, átd, asp, uak
Ummælistíð:	10.01.2024-31.01.2024
Eftirkannað:	13. – 19. februar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum
(Ásetingar í sambandi við kanningar av vanlukkum á sjónum, talgilt samskifti, sjóuppmerking, gjald fyri sýn o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 19. mai 2008, § 2 í løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 61 frá 17. mai 2013, løgtingslóg nr. 122 frá 15. desember 2014, løgtingslóg nr. 85 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 51 frá 7. mai 2019 og § 58 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 13 verður orðað soleiðis:

"**§ 13.** Landsstýrisfólkið ásetir reglur um kanning av vanlukkum á sjónum, sum viðvíkja føroyskum skipum, og øðrum vanlukkum á sjónum við tilknýti til Føroyar, undir hesum vanlukkum, fevndar av altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum, til tess at staðfesta vanlukkuorsøkina og til at fyribyrgja vanlukkur, og kann, um tørvur er á tí, brúka útlendska serfrøði til tess.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um skyldu at boða Sjóvinnustýrinum frá um vanlukkur á sjónum sambært stk. 1."

2. Í § 19, stk. 1, 2. pkt. verður "stk. 1" broytt til: "1. pkt."

3. § 19 b, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Upplýsingar, savnaðar í sambandi við kanningar, sum verða gjørdar sambært

altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum sambært § 13, skulu ikki verða nýttar til annað endamál enn kanningararbeiði:"

4. § 19 b, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Persónar, sum á ein hvønn hátt eru við í arbeiðinum at kanna vanlukkur sambært altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum sambært § 13, hava undir ábyrgd sambært revsilógarinnar §§ 152 og 152 a-152 e skyldu til mótvegis óviðkomandi at halda loyniligt tað, sum teir fáa kunnleika til í sambandi við kanningina."

5. Aftan á § 21 verður í kapittul 3 sett:

"**§ 21 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti við Sjóvinnustýrið um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg ella reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, skal vera elektroniskt.
Landsstýrisfólkið kann áseta, at tað í ávísum førum kann verða givið undantak frá skylduni at samskifta elektroniskt.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um elektroniskt samskifti, undir hesum reglum um nýtslu av ávísum kt-skipanum, serligum talgildum fílasniðum, talgildari undirskrift o.tíl."

6. Aftan á § 31 verður sett:

"**§ 31 a.** Landsstýrisfólkið ella tann myndugleiki, sum landsstýrisfólkið gevur heimild til tess, kann stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um siglingarskipanir og sjóuppmerkingar."

7. § 47 verður orðað soleiðis:

"**§ 47.** Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um gjald fyri sýn, ið Sjóvinnustýrið útinnir sambært hesi løgtingslóg.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um gjald fyri sýn, ið verða umbiðin, undir hesum sýn umborð á útlendskum skipum. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur viðvíkjandi gjaldi fyri arbeiði við góðkenningum ella loyvisbrøvum sambært hesi løgtingslóg.
Stk. 3. Eru brek funnin í sambandi við havnastatseftirlit av einum útlendskum skipi, sum gera, at skipið kann verða lagt, kann Sjóvinnustýrið krevja gjald fyri eftirlitið. Skipið verður ikki leysgivið, fyrr enn kravið er goldið ella trygd sett fyri tí.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um gjaldsháttt, freistir fyri inngjald, áminningarskriv, gjøld og rentur o.tíl. viðvíkjandi gjøldunum sambært stk.1-3."

8. § 48 verður orðað soleiðis:

"**§ 48.** Klassafeløg, virki og einstaklingar, nevnd í §§ 22 og 23, kunnu krevja gjald fyri arbeiði teirra."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 6 kemur í gildi 1. juni 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Kanning av vanlukkum á sjónum
Í 2017 vórðu serligar reglur um fyritreytir fyri kanningar av vanlukkum á sjónum settar í gildi í lógini. Endamálið var, at føroyska lóggávan skuldi liva upp til altjóða koduna um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code. Eftir at reglurnar hava verið í gildi síðani 2017, verður nú mett neyðugt at gera ymiskar nágreiningar bæði í heimildini hjá landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um kanningar av vanlukkum á sjónum, umframt í reglunum um m.a. serliga tagnarskyldu fyri persónar, sum luttaka í kanningararbeiðinum.

Talgilding
Sjóvinnustýrið hevur seinastu árini arbeitt við at menna elektroniskar skipanir til tess at veita brúkarum einfaldar, tryggar og nútíðarhóskandi tænastur. Mett verður, at sum liður í tøkniligu menningini eigur lógin at verða broytt, so landsstýrisfólkið fær neyðuga heimild at áseta reglur um elektroniskt samskifti.

Sjóuppmerking og vitaverk
Løgtingið samtykti í vár at yvirtaka málsøkini, sjóuppmerking og vitaverk, undir hesum siglingarskipanir (navigationssystemer) og skipsrov sambært § 1, stk. 2, nr. 18, í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum.

Í sambandi við yvirtøkuna verður lagt upp til at broyta lóg um trygd á sjónum, soleiðis at lógin eisini fevnir um heimild at stovna og røkja siglingarskipanir og sjóuppmerkingar. Eisini er neyðugt at áseta nærri reglur um siglingarskipanir og sjóuppmerking.

Gjald fyri sýn
Mett verður neyðugt at dagføra galdandi heimildir hjá Sjóvinnustýrinum um gjøld fyri sýn o.a. av skipum, flótandi alibrúkum, útgerð, reiðaríum, rakstrarfeløgum, klassafeløgum o.a.

Sum almennur eftirlits- og góðkenningarmyndugleiki viðvíkjandi trygd á sjónum og verju av havumhvørvinum, áliggur tað Sjóvinnustýrinum m.a. at fremja lógaráløgd reglulig sýn, eftirlitsvitjanir umborð á skipum, hjá reiðarínum, klassafeløgum, undirveitarum o.ø. Sýn av skipum eru í stóran mun latin upp í hendurnar á klassafeløgum, men hetta er m.a. ikki galdandi fyri ávís eldri skip og smærri vinnufør, undir hesum útróðrarflotan, smærri ferðafólkabátar og flótandi alibrúk. Sjóvinnustýrið hevur somuleiðis eftirlit við FAS-flotanum og fremur sum liður í hesum regluliga átakssýn umborð á FAS-skipum, sum hava verið afturhildin í útlendskari havn, ella sum verða mett at vera í vanda fyri at verða afturhildin.

1.2. Galdandi lóggáva

Kanning av vanlukkum á sjónum
Sambært § 13 í lógini hevur landsstýrisfólkið heimild at áseta nærri reglur um kanning av vanlukkum á sjónum, sum viðvíkja skipum og øðrum vanlukkum á sjónum við tilknýti til Føroyar til tess at staðfesta vanlukkuorsøkina og til at fyribyrgja vanlukkur. Harafturat er ásett, at landsstýrisfólkið kann, um tørvur er á tí, brúka útlendska serfrøði til at gera kanningar.

Sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code, MSC 255(84), hava flaggstatir skyldu at kanna sera álvarsligar vanlukkur á sjónum. Sera álvarslig vanlukkur eru, sambært koduni, vanlukkur, har skip er sokkið, hevur kravt mannalív ella hevur elvt til umfatandi umhvørvisdálking. Ein kanning sambært koduni hevur til endamáls at staðfesta vanlukkuorsøkina umframt at fyribyrgja vanlukkum frameftir. Kanningarnar kunnu nýtast sum grundarlag fyri, at stig verða tikin til at broyta lógarkrøv, arbeiðsmannagongdir o.s.fr. Kanningar sambært koduni hava ikki til endamáls at staðfesta møguliga revsiábyrgd ella endurgjaldsábyrgd.

Tað er ongin kunngerð sett í gildi við heimild í § 13. Kanningar av vanlukkum á sjónum verða tó í dag fráboðaðar og gjørdar sambært mannagongd hjá Sjóvinnustýrinum. Til tess at fáa størri gjøgnumskygni verður í næstum farið undir at gera uppskot til kunngerð, sum ásetir nærri karmar fyri kanningarnar. Í hesum sambandi verður mett, at verandi heimild í § 13 eigur at verða víðkað til ítøkiligt at nevna heimild at áseta nærri reglur um skyldu at fráboða eina vanlukku til Sjóvinnustýrið. Í § 21, stk. 3, er longu heimild at áseta reglur um skyldu at fráboða arbeiðsvanlukkur, eitran, arbeiðssjúkur og onnur viðurskifti av týdningi fyri trygd og heilsu.

Talan er um rættiliga víða heimild at áseta reglur um fráboðanarskyldu viðvíkjandi trygdarviðurskiftum hjá manningini. Tá ið fráboðan A frá Sjóvinnustýrinum um arbeiðsumhvørvi umborð á skipum varð sett í gildi í 2013, og altjóða sáttmálin um starvsviðurskifti hjá sjófólkum, MLC, kom í gildi, varð serlig fráboðanarskylda ásett fyri arbeiðsskaðar, undir hesum persónsskaðar umborð á skipum. Serligu reglurnar um arbeiðsskaðar og krøvini í fráboðan A frá Sjóvinnustýrinum hava við sær, at tað í dag í størri mun verður skilt í millum ítøkiligar arbeiðsvanlukkur og aðrar vanlukkur á sjónum samanborið við tíðina, áðrenn reglurnar í fráboðan A frá Sjóvinnustýrinum komu í gildi. Hetta hóast, at tað í nógvum førum er eitt samanfall millum hesar vanlukkur, t.d. um ein vanlukka samstundis hevur havt við sær persónsskaða. Mett verður, at í kjalarvørrinum á serligu reglunum um arbeiðsvanlukkur, eigur at vera sjálvstøðug heimild at áseta reglur um fráboðanarskyldu viðvíkjandi vanlukkum á sjónum.

Í 2016 vórðu neyðugar broytingar gjørdar í lógini til tess at tryggja, at føroyska lóggávan var í samsvari við omanfyrinevndu krøv í altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code. Í hesum sambandi verður eisini víst til Lm. nr. 89/2016.

Í altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code, eru serlig krøv til kanningarnar av sera álvarsomum vanlukkum. Tað er krav um, at ein uttanveltað eind stendur fyri kanningini, umframt at ymiskar upplýsingar, undir hesum vitnisfrágreiðingar, sum verða heintaðar inn í sambandi við kanningina, ikki skulu nýtast til annað endamál enn til kanningararbeiðið. At kanningareindin er uttanveltað, merkir, at hon er óheft frá eftirlitsmyndugleikanum og øðrum myndugleikum, hvørs áhugi kann hugsast at vera í ósamsvari við kanningararbeiðið.

Grundað á kravið í koduni um, at kanningarnar skulu vera uttanveltaðar, hevur vanlig mannagongd verið, síðani málsøkið trygd á sjónum varð yvirtikið í 2002, at í sambandi við kanningar av sera álvarsomum vanlukkum á sjónum verður avtalað við danska kanningarmyndugleikan um at taka sær av kanningini. Á vári 2015 gjørdi Sjóvinnustýrið eina formella samstarvsavtalu við danska kanningarmyndugleikan, Den Maritime Havarikommission. Á henda hátt liva Føroyar upp til kravið í koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum um, at kanningarnar verða gjørdar av eini óheftari kanningareind.

Kanningum av øðrum vanlukkum og hendingum á sjónum tekur Sjóvinnustýrið sær av. Grundað á, at altjóða kodan um kanning av vanlukkum á sjónum bara er altjóða bindandi fyri sera álvarsamar kanningar, er ikki krav, at kanningin á sama hátt skal vera óheft, og er tað tí møguligt, at Sjóvinnustýrið sjálvt kann gera hetta kanningararbeiðið.

§§ 19-19 b í lógini áseta nærri fyritreytir fyri kanningar av vanlukkum á sjónum.

Sambært § 19 hava starvsfólk hjá Sjóvinnustýrinum og teir persónar, sum eru heimilaðir at gera kanningar av vanlukkum á sjónum, heimild til uttan rættarúrskurð at fara umborð á skipini, umframt at fáa atgongd til viðkomandi hølir, vanlukkustað, vraklutir o.a., tá ið tað er viðkomandi fyri kanningararbeiðið. Í § 19 a er ásett, at hesir persónar hava rætt at gera neyðugar mátingar o.a. í sambandi við kanningar, umframt at Sjóvinnustýrið m.a. kann geva skipi boð um at koma til lands, um hetta er neyðugt fyri kanningararbeiðið.

Í § 19 b er ásett, at ávísar upplýsingar, undir hesum m.a. vitnisfrágreiðingar, sum eru savnaðar í sambandi við kanningar av vanlukkum á skipum, ikki skulu nýtast til annað endamál enn til kanningararbeiðið. Eisini hevur greinin áseting um, at upplýsingar, sum eru partur av einum máli um kanning av vanlukku á sjónum, ikki eru fevndar av rættinum til innlit, sambært løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Sum galdandi § 19 b er orðað, eru allar kanningar av vanlukkum á sjónum fevndar av regluni og ikki bara kanningar, sum eru fevndar av koduni. Hetta merkir, at eisini tær kanningar, sum Sjóvinnustýrið ger, og sum ikki eru fevndar av koduni, eru fevndar av § 19 b.

Soleiðis sum økið við kanningum av vanlukkum á sjónum er skipað í dag, har Sjóvinnustýrið kannar aðrar vanlukkur enn tær, sum eru fevndar av altjóða koduni, ger leikluturin hjá Sjóvinnustýrinum sum eftirlitsmyndugleiki, at hesar vanlukkukanningar ikki eru uttanveltaðar og kunnu tá heldur ikki skiljast greitt frá leiklutinum hjá stovninum sum eftirlitsmyndugleiki. Í praksis merkir hetta, at tað er eitt ávíst samanfall millum kanningar av vanlukkum sambært § 13 og eftirlitsskyldu Sjóvinnustýrisins sambært § 2 í lógini. Víst verður í hesum sambandi til § 2, stk. 4, í lógini, har ásett er, at Sjóvinnustýrið umsitur lógina og hevur umsjón við, at lógin eins og reglur, boð og forboð, givin sambært lógini, verða hildin.

Sambært § 4, stk. 1 í lógini hevur Sjóvinnustýrið heimild til at krevja, at viðurskifti, ið eru í stríð við lógina, fyriskipanir ella avgerðir sambært lógini, skulu fáast í rættlag beinanvegin ella eftir nærri ásettari freist. Hetta merkir, at um Sjóvinnustýrið staðfestir slík viðurskifti, so hevur Sjóvinnustýrið skyldu til at krevja, at viðurskiftini verða fingin í rættlag, so at trygdin ikki verður sett í vanda.

Grundað á hesi viðurskifti, ber tað ikki til hjá Sjóvinnustýrinum at virka undir krøvunum í verandi § 19 b.

Uttan mun til um ein kanning av vanlukku á sjónum verður gjørd sambært Casualty Investigation Code ella av Sjóvinnustýrinum, so er endamálið við kanningini ikki at staðfesta revsi- ella endurgjaldsspurning. Víst verður í hesum sambandi til serligu viðmerkingarnar til § 13 í Lm. nr. 28/2001.

Leikluturin hjá Sjóvinnustýrinum sum eftirlitsmyndugleiki ger tó, at ein vanlukka í sjálvum sær og upplýsingar, sum koma fram í arbeiðinum við at gera kanningar, kunnu geva Sjóvinnustýrinum ábendingar um, at brot eru framd á lóggávuna. Hesin leiklutur merkir

samstundis, at Sjóvinnustýrið kann taka avgerð um at fyrireika møguligt sektaruppskot fyri brot á lóggávuna, ið stovnurin umsitur.

Ein broyting av § 19 b til at bara fevna um kanningar, sum verða gjørdar sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, merkir sum útgangsstøði, at vitnisfrágreiðingar og annað tilfar, ið er savnað inn í sambandi við kanningarnar, kann verða nýtt til annað endamál, enn til kanningararbeiðið. Sambært § 19, stk. 3, hava reiðari, skipari og maskinstjóri, ella tey, ið virka teirra vegna, skyldu at veita starvsfólkunum hjá Sjóvinnustýrinum og øðrum heimilaðum neyðuga hjálp og geva allar upplýsingar í sambandi við eftirlitsarbeiði og í sambandi við kanningar av vanlukkum á sjónum sambært § 19, stk. 1. Í hesum sambandi skal tó verða víst á, at hendan skylda bara er galdandi so leingi, sum Sjóvinnustýrið ikki hevur ítøkiligan illgruna um, at viðkomandi persónar hava framt lógarbrot, ella um illgruni er um, at vandi er fyri, at viðkomandi persónar við at lata upplýsingar fara at ákæra seg sjálvar.

Um Sjóvinnustýrið hevur ítøkiligan illgruna um, at viðkomandi persónur møguliga hevur framt lógarbrot, ella at vandi er fyri, at upplýsingar geva slíkar ábendingar, hevur Sjóvinnustýrið, uttan mun til, um talan er um kanning av vanlukku á sjónum ella annað eftirlitsvirksemi, skyldu til at kunna persónin um, at hann hevur rætt til ikki at úttala seg vegna henda illgruna. Í teimum førum, tá ið Sjóvinnustýrið metir, at tað møguliga fyriliggur revsiábyrgd, skal Sjóvinnustýrið sum eftirlitsmyndugleiki í staðin lata løgregluni málið til víðari kanning. Grundað á hesi viðurskifti verður ikki mett, at rættartrygdin hjá sjófólkum ella løgfrøðiligum persónum kemur í vanda, hóast § 19 b verður broytt til bara at vera galdandi fyri kanningar, sum verða gjørdar sambært koduni.

Soleiðis sum økið er skipað í dag, er neyðugt, at § 19 b verður nágreinað til tess at staðfesta, at hon bara er galdandi, tá ið talan er um kanningar, sum verða gjørdar sambært Casualty Investigation Code.

Talgilding
Sambært altjóða sáttmálum er eisini loyvt reiðaríum at varðveita loyvisbrøv o.a. talgilt umborð heldur enn í pappírsformi. Einasta krav í hesum sambandi er, at tað skal kunna vísast fram eftir umbøn frá myndugleikum.

Ein slík heimild er ikki í galdandi løgtingslóg um trygd á sjónum. Tískil verður neyðuga heimildin at áseta nærri reglur í kunngerð um krav at nýta elektroniskt samskifti sett fram í uppskotinum.

Sjóuppmerking og vitaverk
Málsøkini eru í stóran mun stýrd á ikki-lógarásettum grundarlagi. Einasta lóg um virksemi viðvíkjandi vitum og tílíkum installatiónum er lov nr. 68 af 29. marts 1893 om Afståelse af Grund til Fyranlæg m.m.

Í § 5 a í lov nr. 118 frá 28. marts 1951 om forholdsregler til skibsfartens betryggelse, við seinni broytingum, sum varð sett í gildi í Føroyum, var heimild at áseta nærri reglur um sjóuppmerking v.m. Lógin varð avtikin í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum trygd á sjónum í 2002.

Bekendtgørelse nr. 229 af 4. april 1989 om afmærkning m.v. i dansk afmærkningsområde hevur heimild í lógini um forholdsregler til skibsfartens betryggelse. Kunngerðin er ikki kunngjørd í fullum líki í Føroyum og hevur sum útgangsstøði ongantíð verið galdandi í Føroyum. Hetta

hóast tað m.a. í § 16 í kunngerðini galdandi í Danmark (bekendtgørelse nr. 45 af 22. januar 2015 om farvandsafmærkning i dansk og grønlandsk afmærkningsområde m.v.) stendur, at kunngerðin frá 1989 er galdandi í Føroyum. Kunngerðin frá 1989 fevnir m.a. um ásetingar um ábyrgd, umsókn um sjóuppmerking og reglur um sjóuppmerking.

Løgtingslóg um trygd á sjónum, sum kom í gildi 1. januar 2002, tá ið málsøkið trygd á sjónum varð yvirtikið, er ein rammulóg, ið gevur landsstýrisfólkinum víðar heimildir at seta gjøllari reglur í gildi. Sjóvinnustýrið umsitur í dag málsøkið trygd á sjónum.

At myndugleikin kann áseta reglur um sjóuppmerking, verður mett at hava við sær størri greidleika á økinum. Í sambandi við umsóknir um sjóuppmerking ella broytingar í hesum kann tað vera greiðari fyri vinnuna, hvør umsitur økið, og hvar viðkomandi skal venda sær í sambandi við sjóuppmerking.

Gjald fyri sýn
Galdandi løgtingslóg um trygd á sjónum ásetir sum útgangsstøði, at Sjóvinnustýrið ber útreiðslurnar í sambandi við sýn. Í ávísum undantaksførum er heimilað Sjóvinnustýrinum at krevja gjald fyri sýn.

Samstundis er ásett í lógini, at privatir aktørar, viðurkend klassafeløg og aðrir løggildir undirveitarar, sum fremja myndugleikasýn o.a. vegna Sjóvinnustýrið, kunnu krevja gjald fyri sýn. Sjóvinnustýrið metir, at tað sum meginregla eigur at vera óviðkomandi fyri reiðaran, hvør ið fremur sýnið.

Sum dømi fremur Sjóvinnustýrið lógarkravd sýn av óklassaðum skipum og vinnuførum undir 24 metrar. Flestu føroysku fiskiskipini oman fyri 24 metrar eru, sambært lóg, áløgd at vera í einum klassafelag, sum fremur myndugleikasýn vegna Sjóvinnustýrið. Øll vinnufør undir 24 metrar, umframt nøkur gomul skip yvir 24 metrar, eru tó undantikin kravinum at verða sýnað av viðurkendum klassafelag og skulu tí sýnast av Sjóvinnustýrinum. Í galdandi lóg kann Sjóvinnustýrið tó ikki krevja gjald fyri hesi sýn, uttan so, at sýnið kemur undir eitt av serligu og avmarkaðu undantaksførunum í § 47, stk. 2. Rættarstøðan er sostatt tann, at ein reiðari, ið hevur eitt klassað skip hjá einum viðurkendum klassafelag, skal rinda gjald fyri góðkenning, sýn og sertifisering, meðan reiðari við skipi, ið ikki er kravt at verða sýnað av viðurkendum klassafelag, fær somu tænastur framdar av Sjóvinnustýrinum – uttan at gjalda fyri sýnið.

Sjóvinnustýrið hevur í dag onga ella sera avmarkaða heimild at krevja gjøld, meðan privat klassafeløg og aðrir undirveitarar, sum fremja myndugleikasýn vegna Sjóvinnustýrið, hava greiða og víða heimild at krevja gjøld fyri teirra sýnsarbeiði. Í hesum liggur eisini, at ætlaða lógarbroytingin slóðar fyri eini broyting í tí ójavna í kostnaði, sum reiðarar í dag eru fyri, alt eftir, um tað er eitt klassafelag ella Sjóvinnustýrið, ið fremur sýnið.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Kanningar av vanlukkum á sjónum
Við uppskotinum verður heimildin hjá landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um kanningar av vanlukkum á sjónum víðkað til eisini at fevna um at áseta reglur um skyldu at boða Sjóvinnustýrinum frá vanlukkum á sjónum. Endamálið við broytingini er at áseta sjálvstøðuga heimild at áseta slíka fráboðanarskyldu fyri vanlukkur á sjónum, samanborið við heimildina í § 21, stk. 3, sum ítøkiliga nevnir arbeiðsvanlukkur. Sambært fráboðan A frá Sjóvinnustýrinum

um arbeiðsumhvørvi á skipum er serlig regla um fráboðanarskyldu av arbeiðsvanlukkum umborð á skipum. Í galdandi reglum verður sostatt sum útgangsstøði skilt millum arbeiðsvanlukkur og aðrar vanlukkur á sjónum, sum eru fevndar av § 13 í lógini.

Broytingin í § 19 b hevur til endamáls at áseta, at reglurnar bara eru galdandi fyri kanningar, sum verða gjørdar sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code. Her er talan um sera álvarsamar vanlukkur, umframt aðrar vanlukkur, har Sjóvinnustýrið tekur avgerð um, at kanningin skal gerast sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum. Í praksis merkir hetta tær kanningar, sum danski kanningarmyndugleikin, Den Maritime Havarikommision, ger, sambært avtalu við Sjóvinnustýrið. Við hesum verða upplýsingar, sum Sjóvinnustýrið savnar í sambandi við kanningar av vanlukkum, ikki longur fevndar av § 19 b. Leikluturin hjá Sjóvinnustýrinum sum eftirlitsmyndugleiki ger, at eitt ávíst samanfall er í millum kanningar av vanlukkum á sjónum, sum Sjóvinnustýrið tekur sær av til tess at staðfesta vanlukkuorsøkina og at fyribyrgja vanlukkur og eftirlitsskyldu Sjóvinnustýrisins sambært § 2 í lógini.

Talgilding
Sjóvinnustýrið hevur seinastu árini arbeitt við at menna elektroniskar skipanir til tess at veita brúkarum einfaldar, tryggar og nútíðarhóskandi tænastur. Sambært altjóða sáttmálum er eisini loyvt reiðaríum at varðveita loyvisbrøv o.a. talgilt umborð heldur enn í pappírsformi. Einasta krav í hesum sambandi er, at tað skal kunna vísast fram eftir umbøn frá myndugleikum.

Ein slík heimild er ikki í galdandi løgtingslóg um trygd á sjónum. Tískil verður neyðuga heimildin at áseta nærri reglur í kunngerð um krav at nýta elektroniskt samskifti sett fram í uppskotinum.

Siglingarskipanir og sjóuppmerking
Endamálið er at skipa málsøkini á føroyskum hondum. Eftir ætlan verður tað greiðari fyri myndugleikar og vinnuna, hvør umsitur málsøkini, og hvar til ber at venda sær í sambandi við sjóuppmerking.

Gjald fyri sýn
Endamálið við broytingaruppskotinum er at víðka um heimildirnar í lógini til at krevja gjøld fyri sýn, eftirlit, góðkenningar o.a., sum Sjóvinnustýrið ger sum liður í lógaráløgdu eftirlitsuppgávum stovnsins.

Sum almennur eftirlits- og góðkenningarmyndugleiki viðvíkjandi trygd á sjónum og verju av havumhvørvinum, áliggur tað Sjóvinnustýrinum m.a. at fremja lógaráløgd reglulig sýn, eftirlitsvitjanir umborð á skipum, hjá reiðarínum, klassafeløgum, undirveitarum o.ø. Sýn av skipum eru í stóran mun latin upp í hendurnar hjá klassafeløgum, men hetta er m.a. ikki galdandi fyri ávís eldri skip og smærri vinnufør, undir hesum útróðrarflotan, smærri ferðafólkabátar og flótandi alibrúk. Sjóvinnustýrið hevur somuleiðis eftirlit við FAS-flotanum og fremur sum liður í hesum regluliga átakssýn umborð á FAS-skipum, sum hava verið afturhildin í útlendskari havn, ella sum verða mett at vera í vanda fyri at verða afturhildin.

Verandi heimildir til at krevja gjøld fyri sýn eru rættiliga avmarkaðar. Tískil verður mælt til at víðka heimildirnar hjá Sjóvinnustýrinum til at taka gjøld fyri sýn, eftirlit, góðkenningar o.a. Nevnast kann í hesum sambandi, at í m.a. Danmark eru heimildirnar til at krevja gjøld fyri eftirlitsuppgávur viðvíkjandi trygd á sjónum ikki so avmarkaðar sum í føroysku lóggávuni. Í

Danmark er eisini ein kunngerð gjørd, ið nágreinar júst, hvørji sýn Søfartsstyrelsen kann krevja gjald fyri og í hvørjum førum.

Í dag hevur Sjóvinnustýrið onga ella sera avmarkaða heimild at krevja gjøld, meðan privat klassafeløg og aðrir undirveitarar, sum fremja myndugleikasýn vegna Sjóvinnustýrið, hava greiða og víða heimild at krevja gjøld fyri teirra sýnsarbeiði. Í hesum liggur eisini, at ætlaða lógarbroytingin slóðar fyri eini broyting í tí ójavna í kostnaði, sum reiðarar í dag eru fyri, alt eftir, um tað er eitt klassafelag ella Sjóvinnustýrið, ið fremur sýnið.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Kanningar av vanlukkum á sjónum

Við broytingini fær landsstýrisfólkð heimild at áseta nærri reglur um fráboðanarskyldu av vanlukkum á sjónum til Sjóvinnustýrið. Harafturat verður skotið upp, at verandi § 19 b bara verður galdandi fyri kanningar av vanlukkum á sjónum, sum verða gjørdar sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code. Hetta merkir, at serligu reglurnar um tagnarskyldu fyri persónar, sum luttaka í kanningararbeiði og avmarkingar av nýtslu av vitnisfrágreiðingum og øðrum tilfari, sum eru innheintað í sambandi við kanningar, sum útgangsstøði ikki eru galdandi í sambandi við kanningar av vanlukkum, sum Sjóvinnustýrið ger. Sjóvinnustýrið er hóast broytingina framvegis fevnt av reglunum um tagnarskyldu sambært revsilógini og fyrisitingarlógini, umframt at Sjóvinnustýrið í sambandi við kanningar og eftirlit, har illgruni kann standast um møgulig lógarbrot, skal virða rættin hjá hvørjum einstøkum til at ikki ákæra seg sjálvan.

Sjóuppmerking og vitaverk

Lagt er upp til, at tað í løgtingslóg um trygd á sjónum verður heimilað landsstýrisfólkinum ella tí myndugleika, sum landsstýrisfólkið gevur heimild til tess, at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar, undir hesum vitar og føst og flótandi siglingarmerki, sum vegleiða sjóferðslu.

Harafturat er lagt upp til, at landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um sjóuppmerking, undir hesum reglur um ábyrgd fyri, eftirlit við og loyvi til sjóuppmerking. Ætlanin er, at tær nærru reglurnar um sjóuppmerking í fyrstu atløgu skulu taka útgangsstøði í bekendtgørelse nr. 229 frá 4. april 1989 om afmærkning m.v. i dansk afmærkningsområde og í galdandi donsku reglunum.

Talgilding

Landsstýrisfólkið fær við broytingini heimild at áseta nærri reglur um elektroniskt samskifti.

Gjald fyri sýn

Landsstýrisfólkið fær við broytingini heimild at áseta nærri reglur um gjald fyri sýn, eftirlit, góðkenningar o.a., sum Sjóvinnustýrið ger sum liður í lógaráløgdu eftirlitsuppgávum stovnsins.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum varð sent til ummælis hjá Fiskimannafelagnum, Fiskimálaráðnum, Fjarskiftiseftirlitinum, Fólkaheilsuráðnum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Havbúnaðarfelagnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Landsverki, Maskinmeistarafelagnum, Meginfelag útróðrarmanna, Føroya Reiðarafelag, Reiðarafelagnum

fyri handilsskip, Sjóvinnustýrinum, Umhvørvismálaráðnum, Umhvørvisstovuni, Vinnuhúsinum og VØRN.

Fólkaheilsuráðið og VØRN høvdu ikki viðmerkingar til uppskotið. Umhvørvismálaráðið tekur undir við broytingunum og hevði annars ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

Landsverk hevði eina stutta viðmerking til orðingina, *altjóða koda,* í mun til enska heitið. *Casualty Investigation Code*. Landsverk vísti á, at hendan orðingin møguliga ikki er nóg greið ella neyv; Landsverk vísti á, at føroyska orðið fyri enska orðið, *code,* er orðið, *reglur,* ella orðið, *lógir*. Orðið, *koda,* á føroyskum er tað sama sum enska orðið, *password* ella *loyniorð*.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at orðingin stavar úr IMO, og orðið, *koda*, er beinleiðis týtt úr enskum fyri orðið, *code*, ið á enskum eins og á føroyskum eisini kann merkja reglur. Fyri at vera so nær IMO kodunum og ensku málberingunum, verður verandi orðing mett at vera nøktandi.

Umhvørvisstovan vísti á, at tað er gott, at greiðar reglur verða ásettar um siglingarskipanir og sjóuppmerkingar. Umhvørvisstovan spurdi samstundis, um tað er greitt, hvør hevur ábyrgdina av uppgávuni at senda út fráboðanir til siglandi (Efterretninger for søfarende). Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur síðani kunnað Umhvørvisstovuna um, at yvirskipað hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið ábyrgd av økinum – eisini fráboðanir til siglandi. Uppgávan er løgd til Sjóvinnustýrið at skipa í samstarvi við partarnar, undir hesum Sjókort, MRCC og Landsverk. Arbeiðið við at skipa økið og gera mannagongdir o.a. er tó ikki liðugt.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevði ikki viðmerkingar til uppskotið. Í mun til viðmerkingar fyri smærri vinnufør, undir hesum flótandi alibrúk, vísti felagið til ummælið frá Havbúnaðarfelagnum.

Havbúnaðarfelagið vísti í sínum ummæli á, at alivinnan er undir eftirliti av fleiri myndugleikum, undir hesum Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Av tí at fleiri myndugleikar fremja eftirlit, mælir Havnbúnaðarfelagið til, at viðkomandi myndugleikar saman við Havbúnaðarfelagnum tryggja, at markamótini millum ymisku myndugleikarnar verða greitt lýst og avmarkað, so at hesi eftirlit samstarva.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við Havbúnaðarfelagnum; at tað er týdningarmikið, at eftirlitini samskipa tað soleiðis, at virksemið hjá alivinnuni verður órógvað minst møguligt í sambandi við eftirlit. Sjóvinnustýrið hevur í hesum sambandi víst á, at eftirlit við aliringum o.ø. verður samskipað við Heilsufrøðiligu starvsstovuna, t.d. tá ið aliringar liggja brakk.

Havbúnaðarfelagið vísti eisini á, at galdandi kunngerð um ‘’flydende fiskeopdrætsanlæg’’ eigur at dagførast, áðrenn man byrjar at gera sýn av flótandi alibrúkum. Havbúnaðarfelagið mælir til, at Sjóvinnustýrið saman við Havbúnaðarfelagnum finnur eina loysn, sum hóskar til virksemið, sum er í dag. Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við hesum, og hevur heitt á Sjóvinnustýrið um at seta seg í samband við Havbúnaðarfelagið um hetta.

Havbúnaðarfelagið metir tað hava týdning, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið lýsir, hvussu kunngerðin samspælir við aðra lóggávu, sum Uttanríkis- og vinnumálaráðið varðar av, undir hesum hvørjar avleiðingar verða, um eitt alibrúk ikki megnar at tillaga eina sýnsviðmerking, áðrenn eina ásetta freist, t.d. vegna liggjandi illveður á einum alifirði.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at alibrúk skulu lúka krøvini í lógini og við tí freist, sum eftirlitið setir. Eftirlitið ger í hesum sambandi eina meting við støði í m.a. lóg um trygd á sjónum, hvat er ráðiligt at gera. Harumframt fer eitt samskifti fram millum eftirlit og alibrúk, soleiðis at krøv og treytir kunnu verða rætt og rímilig.

Havbúnaðarfelagið vísti harafturat á, at heimildir at áseta gjøld eiga at verða grundaðar á skjalprógvaðar útreiðslur hjá Sjóvinnustýrinum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, tá ið talan er um gjald fyri sýn, er talan um gjald fyri útreiðslur í sambandi við einstaka sýnið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Sjóvinnustýrið fer at hava eina størri umsitingarliga byrðu í samband við innkrevjing av gjøldunum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið heimilar Sjóvinnustýrinum at áseta gjald fyri sýn, og uppskotið kann tí hava fíggjarligar avleiðingar við sær. Eftir ætlan verða reiðarar á skipum, ið ikki verða sýnað av klassafeløgum, frameftir at gjalda fyri sýn, ið Sjóvinnustýrið fremur. Reiðarar á skipum, ið onkursvegna hava fingið staðfest manglar ella brek, og tí fáa eyka sýn frá Sjóvinnustýrinum, fara eftir ætlan eisini frameftir at skula gjalda fyri hetta. Afturat hesum kann landsstýrisfólkið í kunngerð áseta gjald fyri sýn, tá ið talan er um onnur før, flótandi alibrúk, útgerð, reiðarí, rakstrarfeløg, klassafeløg o.a.

Uppskotið hevur við sær meirútreiðslur fyri skipaeigarar og onnur, ið higartil ikki hava goldið fyri sýn, framd av Sjóvinnustýrinum, men hesar útreiðslur gera, at tað er meira javnt ímillum reiðarí. Sum nú er, er tað stórur munur á, um skipið hjá einum reiðaríi verður sýnað av einum klassafelag ella ikki.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Kanningar av vanlukkum á sjónum
IMO hevur í Casualty Investigation Code ásett altjóða mannagongdir fyri kanning av vanlukkum á sjónum. Heimildin at áseta nærri reglur um kanning av vanlukkum og aðrar hendingar á sjónum verður ásett sum fylgja av Casualty Investigation Code, sum áleggur flagglondum at kanna óhapp og vanlukkur, sum henda á sjónum. Víst verður til Lm. nr. 89/2016.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), Evropeiska mannarættindasáttmálan sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Við hesum uppskoti fær landsstýrisfólkið heimild at áseta nærri reglur um gjald fyri sýn o.a. Gjøldini verða grundað á útreiðslurnar hjá Sjóvinnustýrinum.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Kanning av vanlukkum á sjónum
Landsstýrismaðurin fær heimild at áseta nærri reglur um skyldu at boða Sjóvinnustýrinum frá um vanlukkur og aðrar hendingar á sjónum. Við hesum er ætlanin at lýsa eina kunngerð, sum ásetur nærri reglur um, hvørjar vanlukkur og hendingar skulu boðast frá.

Talgilding
Landsstýrisfólkið fær við broytingini heimild at áseta nærri reglur um elektroniskt samskifti.

Sjóuppmerking
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum ella tí myndugleika, sum landsstýrismaðurin gevur heimild til tess, at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar. Lógaruppskotið heimilar eisini landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um siglingarskipanir og sjóuppmerkingar.

Gjald fyri sýn
Landsstýrisfólkið fær við broytingini heimild at áseta nærri reglur um gjald fyri sýn, eftirlit, góðkenningar o.a., sum Sjóvinnustýrið ger sum liður í lógarálagdu eftirlitsuppgávum stovnsins.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri plass ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1

§ 13, stk. 1
Fyrsti liður í broytingini snýr seg um at broyta heitið landsstýrimaður til landsstýrisfólk. Broytingin verður gjørd sum ein avleiðing av komandi broytingum í Tingskipanini, sum vórðu samtyktar í mai 2023.

Í seinna liði í broytingini verður ásetingin broytt soleiðis, at altjóða kodan um kanningar av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code, verður beinleiðis nevnd í lógartekstinum.

Sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code, hava flaggstatir skyldu at kanna sera álvarsligar vanlukkur á sjónum. Sera álvarsligar vanlukkur eru sambært koduni vanlukkur, har skip er sokkið, onkur hevur latið lív ella umfatandi umhvørvisdálking er hend. Endamálið við broytingini er at gera tað greiðari, at munur kann vera á kanningum av sera álvarsomum vanlukkum, sum eru fevndar av bindandi partinum av koduni og á øðrum vanlukkukanningum.

Ein kanning sambært koduni hevur til endamáls at staðfesta vanlukkuorsøkina, umframt frameftir at fyribyrgja vanlukkum. Kanningarnar kunnu nýtast sum grundarlag fyri, at stig verða tikin til at broyta lógarkrøv, arbeiðsmannagongdir o.s.fr. Kanningar sambært koduni skulu ikki hava til endamáls at staðfesta møguliga revsi- ella endurgjaldsábyrgd. Sambært koduni er harafturat krav um, at kanningarnar skulu vera uttanveltaðar. At kanningareindin er uttanveltað, merkir, at hon er óheft frá eftirlitsmyndugleikanum og øðrum myndugleikum, hvørs áhugi kann hugsast at vera í ósamsvari við kanningararbeiðið.

Í dag hevur Sjóvinnustýrið eina samstarvsavtalu við danska kanningarmyndugleikan, Den Maritime Havarikommission, ið er uttanveltaða kanningareindin í Danmark. Sambært avtaluni kannar danski kanningarmyndugleikin sera álvarsligar vanlukkur, fevndar av Casualty Investigation Code, sum viðvíkja føroyskum skipum, ella tá ið álvarsligar vanlukkur hava tilknýti til Føroyar. Harafturat kann Sjóvinnustýrið heita á danska kanningarmyndugleikan um at kanna vanlukkur, ið verða mettar at vera av serligum samfelagsligum týdningi og áhuga. Aðrar vanlukkur á sjónum, sum ikki eru fevndar av altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum, kannar Sjóvinnustýrið.

§ 13, stk. 2
Við hesum verður skotið upp, at verandi heimild í § 13 um, at landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um kanningar av vanlukkum á sjónum verður víðkað og nágreinað til, at hendan heimild eisini fevnir um at áseta reglur um skyldu at boða Sjóvinnustýrinum frá um vanlukkur.

Til § 1, nr. 2

§ 19, stk. 1
Talan er um málsliga rætting.

Til § 1, nr. 3

§ 19 b, stk. 1
Í altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code, eru serlig krøv til kanningarnar av sera álvarsomum vanlukkum. Tað er krav um, at ein óheft eind stendur fyri kanningini, umframt at ymiskar upplýsingar, undir hesum vitnisfrágreiðingar, sum verða heintaðar inn í sambandi við kanningina, ikki skulu nýtast til annað endamál enn til kanningararbeiðið. At kanningareindin er óheft merkir, at hon er óheft frá eftirlitsmyndugleikanum og øðrum myndugleikum, hvørs áhugi kann hugsast at vera í ósamsvari við kanningararbeiðið.

Í § 19 b er ásett, at ávísar upplýsingar, undir hesum m.a. vitnisfrágreiðingar, sum eru savnaðar í sambandi við kanningar av vanlukkum á skipum, ikki skulu nýtast til annað endamál enn til kanningararbeiðið. Eisini hevur greinin áseting um, at upplýsingar, sum eru partur av einum máli um kanning av vanlukku á sjónum, ikki eru fevndar av rættinum til innlit, sambært løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Sum galdandi § 19 b er orðað, eru allar kanningar av vanlukkum á sjónum fevndar av regluni og ikki bara kanningar, sum eru fevndar av koduni. Hetta merkir, at eisini tær kanningar, sum Sjóvinnustýrið ger, og sum ikki eru fevndar av koduni, eru fevndar av § 19 b.Við hesum verður skotið upp at broyta greinina, so at hon framvegis bara verður galdandi fyri kanningar, sum verða gjørdar sambært altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code.

Endamálið er ikki at broyta grundarlagið undir kanningunum av vanlukkum á sjónum. Vanlukkukanningar, sum ikki eru fevndar av Casualty Investigation Code, og sum Sjóvinnustýrið ger, skulu framvegis verða gjørdar við tí endamáli at finna vanlukkuorsøkina og at fyribyrgja vanlukkum í framtíðini. Víst verður í hesum sambandi til § 13 í lógini, sum ítøkiliga ásetir hetta endamál.

Eins og fyri kanningar, sum eru fevndar av altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum, er endamálið við øðrum kanningum ikki at staðfesta revsi- ella endurgjaldsspurning.

Soleiðis sum økið er skipað í dag, har Sjóvinnustýrið kannar aðrar vanlukkur, ger leikluturin hjá Sjóvinnustýrinum sum eftirlitsmyndugleiki, at hesar vanlukkukanningar ikki eru uttanveltaðar og kunnu tí ikki skiljast greitt frá leiklutinum hjá stovninum sum eftirlitsmyndugleiki. Í praksis er tað sostatt eitt ávíst samanfall millum kanningar av vanlukkum sambært § 13 og eftirlitsskyldu Sjóvinnustýrisins sambært § 2 í lógini. Víst verður í hesum sambandi til § 2, stk. 4, í lógini, har ásett er, at Sjóvinnustýrið umsitur lógina og hevur umsjón við, at lógin eins og reglur, boð og forboð, givin sambært lógini, verða hildin.

Sambært § 4, stk. 1, í lógini hevur Sjóvinnustýrið heimild til at krevja, at viðurskifti, ið eru í ósamsvari við lógina, fyriskipanir ella avgerðir sambært lógini, skulu fáast í rættlag beinanvegin ella eftir nærri ásettari freist. Hetta merkir, at um Sjóvinnustýrið staðfestir slík viðurskifti, so hevur myndugleikin skyldu til at krevja, at viðurskiftini verða fingin í rættlag til tess, at trygdin ikki verður sett í vanda.

Við verandi § 19 b kann ivi verða sáddur um, hvørt Sjóvinnustýrið hevur heimild til at seta kravboð o.a., grundað á upplýsingar, sum eru savnaðar í sambandi við eina kanning av vanlukku á sjónum sambært § 13. Soleiðis sum økið er skipað í dag, er tí neyðugt at § 19 b verður nágreinað til tess at staðfesta, at hon bara er galdandi, tá ið talan er um kanningar, sum verða gjørdar sambært Casualty Investigation Code.

Uttan mun til um ein kanning av vanlukku á sjónum verður gjørd, sambært Casualty Investigation Code ella av Sjóvinnustýrinum, so er endamálið við kanningini ikki at staðfesta revsi- ella endurgjaldsspurning.

Leikluturin hjá Sjóvinnustýrinum sum eftirlitsmyndugleiki ger tó, at ein vanlukka í sjálvum sær og upplýsingar, sum koma fram í arbeiðinum við at gera kanningar, kunnu geva Sjóvinnustýrinum ábendingar um, at brot eru framd á lóggávuna. Hesin leiklutur merkir samstundis, at Sjóvinnustýrið kann taka avgerð um at fyrireika møguligt sektaruppskot fyri brot á lóggávuna, ið stovnurin umsitur.

Sambært § 19, stk. 3, hava reiðari, skipari og maskinstjóri, ella tey, ið virka teirra vegna, skyldu at veita starvsfólkunum hjá Sjóvinnustýrinum og øðrum heimilaðum neyðuga hjálp og geva allar upplýsingar í sambandi við eftirlitsarbeiði og í sambandi við kanningar av vanlukkum á sjónum, sbr. § 19, stk. 1. Í hesum sambandi skal verða víst á, at hendan skylda bara er galdandi so leingi, sum Sjóvinnustýrið ikki hevur ítøkiligan illgruna um, at viðkomandi persónar hava framt lógarbrot ella um illgruni er um, at vandi er fyri, at viðkomandi persónar við at lata upplýsingar fara at ákæra seg sjálvan. Um Sjóvinnustýrið hevur ítøkiligan illgruna um møgulig lógarbrot hjá viðkomandi persónum, ella at vandi er fyri, at upplýsingar geva slíkar ábendingar, hevur Sjóvinnustýrið, uttan mun til um talan er um kanning av vanlukku á sjónum ella annað eftirlitsvirksemi, skyldu til at kunna persónin um, at hann hevur rætt til ikki at úttala seg vegna henda illgruna. Í slíkum førum, tá ið Sjóvinnustýrið metir, at tað er neyðugt at kanna møguliga revsiábyrgd nærri, skal Sjóvinnustýrið sum eftirlitsmyndugleiki í staðin lata løgregluni málið til víðari kanningar. Grundað á hesi viðurskifti verður ikki mett, at rættartrygdin hjá sjófólkum ella løgfrøðiligum persónum kemur í vanda, hóast § 19 b verður broytt til bara at vera galdandi fyri kanningar, sum verða gjørdar sambært koduni.

Til § 1, nr. 4

§ 19 b, stk. 2
Broytingin er ein avleiðing av broytingini, sum verður skotin upp í § 19 b, stk. 1. Við hesum verður § 19 b, stk. 2, broytt til bara at verða galdandi fyri kanningar av vanlukkum á sjónum, sum eru fevndar av altjóða koduni um kanning av vanlukkum á sjónum, Casualty Investigation Code.

Til § 1, nr. 5

§ 21 a
Við ásetingini verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um, at skrivligt samskifti við myndugleikar um viðurskifti, sum eru fevnd av løgtingslógini, ella sum ásett við heimild í løgtingslógini, skal vera elektroniskt. Heimildin er ætlað til, at lógin um trygd á sjónum kann verða búgvin til talgilda veruleikan í dagsins sjóvinnu.

Sjóvinnustýrið hevur seinastu árini arbeitt við at menna elektroniskar skipanir til tess at veita brúkarum einfaldar, tryggar og nútíðarhóskandi tænastur. Sambært altjóða sáttmálum er eisini loyvt reiðaríum at varðveita loyvisbrøv o.a. talgilt umborð heldur enn í pappírsformi. Einasta krav í hesum sambandi er, at tað skal kunna vísast fram eftir umbøn frá myndugleikum.
Ein slík heimild er ikki í galdandi løgtingslóg um trygd á sjónum. Tískil verður neyðuga heimildin at áseta nærri reglur í kunngerð um krav at nýta elektroniskt samskifti sett fram í uppskotinum.

Til § 1, nr. 6

§ 31 a, stk. 1
§ 31 a, stk. 1, tekur útgangsstøði í § 5 a, stk. 1, í lov nr. 118 af 28. marts 1951 om forholdsregler til skibsfartens betryggelse við seinni broytingum, sum fyrr hevur verið galdandi í Føroyum, og § 8 í lov om sikkerhed til søs sambært lovbekendtgørelse nr. 72 af 17. januar 2014, sum er galdandi í Danmark. Landsstýrisfólkinum ella tí myndugleika, landsstýrisfólkið gevur heimild til tess, verður heimilað at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerking og at halda tær við líka við tí endamáli at fremja trygga ferðslu á sjónum.

Við sjóuppmerking verður m.a. hugsað um vitar, føst og flótandi siglingarmerki og tokulúður, sum virkar sum vegleiðing fyri sjóferðslu. Við siglingarskipanir verður hugsað um skipanir á landi, sum stuðla undir, at skip halda røttu kós sum t.d. DGPS-skipanir, radiosiglingarskipanir, fráboðanir og ávaringar til siglandi.

§ 31 a, stk. 2
Ásetingin heimilar landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um sjóuppmerking. Ætlanin er, at landsstýrisfólkið í kunngerð ásetir reglur um m.a. ábyrgd fyri, eftirlit við og loyvi til sjóuppmerking.

Til § 1, nr. 7

§ 47
Við hesi grein fær landsstýrisfólkið víðari heimildir at áseta reglur í kunngerð um gjald fyri sýn. Heimildin fevnir bæði um sýn av skipum, flótandi alibrúkum, útgerð, reiðaríum, rakstrarfeløgum, klassafeløgum o.a. og arbeiði í samband við góðkenningar og útskriving av loyvisbrøvum. Harafturat er orðingin broytt soleiðis, at heimildin ikki er tongd at, um sýnið er álagt eftir løgtingslógini, men heldur fer fram sambært lógini.

Til § 1, nr. 8

§ 48
Ásetingin er neyvt tann sama, sum ásetingin í galdandi § 47, stk. 3, í løgtingslóg um trygd á sjónum. Ásetingin hevur sostatt ikki nakra broyting við sær.

Til § 2

Lagt verður upp til, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Í mun til § 1, nr. 6, verður lagt upp til, at ásetingin kemur í gildi 1. juni 2024, tá ið málsøkini sjóuppmerking og vitaverk verða yvirtikin. Í hesum sambandi verður víst til løgtingslóg nr. 60 frá 22. mai 2023 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 7. mars 2024

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Landsverk
Fylgiskjal 3: Umhvørvismálaráðið
Fylgiskjal 4: Umhvørvisstovan
Fylgiskjal 5: Reiðarafelagið fyri Handilsskip
Fylgiskjal 6: Havbúnaðarfelagið